## Alivinnan ein umhvørvisbumba – ferðavinnan við at syndrast

VERKFALL
*Jan Müller*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður vónar, at verkfallið nú verður av, nú partarnir á arbeiðsmarknaðinum aftur eru savnaðir til at finna seming. Avgjørt neyðugt er at nakað ítøkiligt hendir nú. Støðan í alivinnuni er so álvarsslig, at man kann ikki bíða longur. Ætlanin hjá landsstýrismanninum var at lóggeva um alivinnuna men tá tað frættist mánakvøldið at partarnir fóru aftur til samráðingarborðið, helt hann at tað fór at bera til at fáa eina semju.

Um støðuna í alivinnuni sigur landsstýrismaðurin, at landsdjóralæknin hevur gjørt eina frágreiðing sum ikki er nakar hugnaligur lesnaður. Hon vísir, at alivinnan er vorðin ein umhvørvisbumba. Fimm alibrúk eru um at fara av knóranum og sum hava eitt virði uppá 300 mill. kr.

Uppá fyrispurning hví man ikki hevur lagt uppí frá politiskari síðu nú alivinnan er um at fáa banahøgg sigur Bjarni Djurholm, at stóð tað til hansara so hevði tað longu verið gjørt fyri alivinnuna, men tað hevur ikki borið til. Man skal hava politiskan ryggdekning fyri at gera tað og tað eru ikki allir, sum hava mett, at tíðin hevur verið búgvin til tað.

Landsstýrismaðurin ber eisini stóra ótta fyri ferðavinnuni. Alt tað sum er bygt upp gjøgnum fleiri ár er við at fara fyri skeyti. Í sambandi við dystin móti Týskalandi koma nógvir útlendingar til Føroya. Eitt nú fleiri av keypararunum av føroyskum alilaksi til at hyggja eftir alivinnuni.

– Nú hava vit brúkt nógva orku at profilera Føroyar so tað verður eisini eitt annað bílat útlendsku tíðindafólkini fáa av Føroyum, tá tey koma í næstu viku, nú alt samfelagið liggur nærum lamið, har tómar hyllar, tóm virki osfr. eru gerandismyndin.

Nýggi franski sendiharrin í Danmark:

# Vil menna samvinnuna við Føroyar



*Franski sendiharrin her saman við Julionnu Klett, nýggja franska konslinum uttanfyri Vertshúsið, sum flaggaði við teimum røttu litunum henda dagin*

*Mynd Jan Müller*

SENDIHARRAVITJAN
*Jan Müller*

Herfyri vitjaði nýggi franski sendiharrin í Danmark, Régis de Belenet Føroyar á fyrstan sinni. Hetta hendi um somu tíð, sum Julianna Klett, advokatur varð útnevnd til nýggjan franskan konsul í Føroyum eftir Valdemar Lützen, sum hevur ynskt at leggja frá sær. Konslaembætið hevur annars verið í Lützenfamiljuni í 104 ár. Tað var undir nýggjum og hugnaligum umhvørvi, at franski sendiharrin beyð fyrst til tíðindafund og seinni til móttøku fyri innbodnum, nevniliga í nýggja Vertshúsinum í Havn, sum okkara kendi listamaður Tróndur Patursson hevur gjørt litríkt og livandi við sínum sertøku litum og glaslistaverkum.

Franski sendiharrin, sum hevur verið í uttanríkistænastu í 34 ár, er útbúgvin í politiskari vísind og løgfrøði. Hann hevur m.a. verið ráðgevi hjá verjumálaráðharranum, hevur verið sendiharri í Ruslandi, áðrenn Múrurin fall, hann hevur verið í Nato og hevur eisini verið sendiharri í Jibuti og Eritrea umframt í Sweits og Lichtenstein. Nú hevur hann so sæti í Keypmannahavn og hevur sum sítt arbeiðsøki eisini Føroyar og Grønland.

Vitjanin varð nógv merkt av okkara fiskivinnusamstarvi við Frakland, har hann m.a. vitjaði virki umframt at hitta umboð fyri landsstýrið, her bæði løgmann og varaløgmann. Sendiharrin fegnast um fiskivinnusamstarvið við Føroyar og ivast ikki í, at føroyingar hava møguleika at útflyta uppaftur meira av teimum serstøku fiskavørunum, sum fraklendingum dáma.

Sendiharrin kom til Føroya við nýggju Norrønu, og hann heldur skipið vera sera gott at ferðast við. Hann heldur møguleikar skuldu verið at fingið fleiri fronsk ferðafólk henda vegin. Her hugsar hann m.a. um ferðafólk, sum dáma náttúru og serstakar mentanir heldur enn at leita sær í onnur lond.

Hann er fegin um at tað eru nógvir føroyskir ungdómar, sum velja at læra franska málið og heldur hann fyri, at hetta kann vera við til at knýta enn sterkari bond millum londini. Møguleikar skulu so eisini verið hjá føroyingum at farið til Fraklands at læra mál og mentan. Her eru møguleikar at søkja um stuðul.

Uppá fyrispurning um hann heldur vónir eru fyri at stóra franska oljufelagið TotalFinaElf fer at vísa føroyska landgrunninum áhuga í framtíðini sigur sendiharrin, at feløgini fylgja gongdini í Føroyum. Tey hava verið virkin her eina tíð men tóku seg aftur, tá fyrsta útbjóðingin gjørdist veruleiki, eitt nú orsakað av treytunum og tí tað ikki var so lætt at fáa samstarv við nakað føroyskt oljufelag. Hann helt fyri, at feløgini eru opin fyri nýggjum avbjóðingum og duldi heldur ikki fyri, at eins og onnur oljufeløg so má metast, at eisini fronsk feløg fara at vísa eini komandi útbjóðing í føroyskum øki ans. Hetta vil tó altíð vera ein spurningur um oljutilgongdina í heiminum sum heild og annars um tær reglur og treytir, sum verða galdandi. Hann útilokaði tó ikki, at møguleiki er at síggja fronsk oljuáhugamál í føroyskum øki í framtíðini.



*Frá tíðindafundinum inni í teimum snotuligu og hugnaligu hølunum í Verthúsinum*

*Mynd Jan Müller*



# Gjalda mest, men eru harðast raktir

**- Tað er hugstoytandi, at alarar, sum yvirhøvur gjalda sínum arbeiðsfólki meira enn vanliga tímaløn, eru teir, sum eru harðast raktir av verkfallinum, sigur Súni Durhuus á Vestlax**

ALING OG VERKFALL
*Vilmund Jacobsen*



*- Tað er ógvuliga keðiligt, at júst alarar verða so hart raktir hvørja ferð, verkfall er, tí tey, sum starvast í alivinnuni, tjena meira enn vanligu tímalønina, sigur Súni Durhuus á Vestlax*

Líkt er til, at tað er torført at fáa eina heildarmynd av, hvussu alivinnan hevur verið fyri undir hesum verkfallinum, sum nú hevur vart í meira enn fýra vikur.

Har alibrúk eru rakt av ILA-sjúku, hava arbeiðarafeløgini givið avmarkaði undantaksloyvir at taka fisk til tess at byrgja uppfyri ov stórum felli. Er ILA í útbroti, doyr nógvur fiskur, og smittan breiðir seg skjótt.

Velduga stór virðir standa uppá spæl, og eitt ILA-rakt alibrúk hevur verið samanborið við eina stóra fiskagoymslu, sum stendur í ljósum loga.

Heilsumyndugleikarnir á økinum krevja, at alibrúk, sum eru rakt av ILA, skulu tømast sum skjótast. Nú verkfall er, verður kapasiteturin hareftir, tí talið av arbeiðsfólki er avmarkað, og allur fiskurin skal frystast.

Sosialurin vitjaði í Gøtu stutt eftir, at verkfallið byrjaði. Har stríddust tey við at taka ILA-sjúkan fisk upp úr nótunum, soleiðis at fellið ikki verður ov stórt. Í tveimum nótum við 800 tonsum av fiski, høvdu tey ILA í útbroti, og í byrjanini doyðu einir 250 fiskar um dagin.

Vit hava skilt, at støðan hevur verið uppaftur truplari hjá teimum á Bakka, har nógv størri nøgdir av fiski eru deyðar. Ovasti leiðarin fyri alingini har hevur tó ikki viljað tosað alment um støðuna.

### Vestlax stabilt

Súni Durhuus á Vestlaxi og Vestsalmon, sum bæði hevur smoltaling, sjógvaling og sláturvirki, sigur, at eini 120 fólk, sum starvast hjá teirra feløgum, eru í verkfalli.

- Men vit hava ikki havt tað stóra fellið hesaferð, tí støðan hjá okkum í løtuni er rímiliga stabil. Hetta hevur hóast alt lætt nógvum. Verri var undir seinasta verkfalli, tá ið ILA-sjúka ræ ttiliga gjørdi um seg.

Alt arbeiði á sláturvirkinum í Kollafirði hevur ligið stilt seinastu fýra vikurnar, men tað hevur eydnast teimum, sum starvast hjá feløgunum og ikki eru í verkfalli, at hildið lív í fiskinum.

- Fóðurskipaninar til smoltalingina og sjógvalingina eru sjálvvirkandi, og hetta lættir ómetaliga nógvum undir slíkum umstøðum, sigur Súni.

### Hugstoytandi

Súni Durhuus heldur tað vera hugstoytandi, at verkfallið rakar alivinnuna so hart hvørja ferð, verkfall er, tí veruleikin er, at tey, sum starvast runt um á alibrúkunum, fáa meira løn enn vanligu tímalønina.

Spurdur, hví hesi fólk eru betur lønt enn onnur, sum gera vanligt tímalønt arbeiði, sigur hann:

- Hetta kemst av, at tey arbeiða undir stórari ábyrgd, tí tað, tey fáast við, er livandi fiskur, sum krevur sína dagligu røkt.

Hann heldur tað tí vera ógvuliga keðiligt, at júst alarar verða so hart raktir hvørja ferð, verkfall er.

- Og ringast er, har sjúka er við at taka fótin undan alarunum, sigur Súni Durhuus.

Vestlax hevur aling í eitt nú Vestmanna, Sundalagnum, Fuglafirði og á Oyndarfirði.

Á sláturvirkinum hjá Vestsalmon í Kollafirði arbeiða eini 80 fólk í tveimum vaktum.

Løgmaður:

# Partarnir eiga trætuna

**Løgmaður heldur ikki, at tað er rætt at blanda seg í trætuna á arbeiðsmarknaðinum**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*

Landsstýrið við løgmanni, Anfinn Kallsberg, á odda gjørdi í vikuni av ikki at leggja upp í fyri at gera ein enda á verkfallinum. Løgmaður hevur higartil umvegis fjølmiðlarnar heitt á partarnar á arbeiðsmarknaðinum um at finna eina semju. Men hevur ikki verið beinleiðis í sambandi við partarnar.

Hetta átalaði fyrrverandi løgmaðurin, Atli Dam, tann núverandi av slagnum fyri í Sosialinum.

Atli Dam segði tá:

“Løgmaður átti ikki at givið pørtunum boð umvegis fjølmiðlarnar, men hann skuldi havt kallað teir saman og givið teimum eina ordiliga yvirháling, soleiðis at teir settu seg at finna eina semju.”

Men hesum er Anfinn Kallsberg ikki samdur við honum í.

– Entin eru tað partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum loysa trætuna, ella eru tað politikararnir. Tá vit sum politikarar ikki fara upp í málið, so skulu vit eisini halda okkum frá at blanda okkum, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður sigur seg fylgja eftir førimuni væl við í verkfallinum, men hann hevur onga ætlan um at blanda seg.

Landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum í vinnumálum, Bjarni Djurholm, hevur heitt á semingsmenninirnar um at fara aftur til partarnar. Men hetta hugskotið hevur Bjarni Djurholm ikki fingið frá sær, sigur løgmaður. Kortini fáa vit ikki løgmann at siga, at hetta var skeivt gjørt.

Fólkaflokkurin hevur í fjølmiðlunum boða frá, at hann er til reiðar at gera ein enda á verkfallinum, finna partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki eina semju. Men hesa útsagnina vil løgmaður als ikki gera viðmerkingar til. Hann vísir bert til formanninum fyri flokkin, Òla Breckmann.



*Anfinn Kallsberg heldur, at hann hevur gjørt sína skyldu í sambandi við verkfallið*

## Broytingar hjá Jacques

Fríggjakvøld verða nú meira føroysk í Jacques. Føroyska tilhaldsstaðið við Nørreport broytti herfyri navn frá Jack-Ways til Jacques.

Fríggjakvøldið hevur Jacques verið útleigað til Club Schhhh, sum hevur spælt nógv øðrvísi tónleik, enn leygarkvøldini bjóða á Jacques.

Hetta er nú liðugt. Fríggjakvøld vil live tónleikur verða spældur Jacques. Nú fríggjakvøldið verða tað Pætur við Keldu og Eyðun Nolsøe, sum fara at spæla.

Seinni út á náttina verður diskotek, har Eyðfinn Drewsen fer at velja løgini.

Jacques sýnir annars báðar landsdystirnar hjá Føroyum - móti Íslandi og Týsklandi.